# Reglugerð fyri kirkjugarðarnar í Tórshavnar kommunu



1. Kirkjugarðurin er vígdur friðarstaður, sum eingin má órógva.

2. Gingið eigur bert at verða á kirkjugarðsgøtunum, og har, sum ikki er grivið.

3. Fólk, sum vitja inni í kirkjugarðinum, skulu lata portur væl aftur eftir sær.

4. Hundar skulu ikki ganga leysir og annar fenaður skal ikki verða í kirkjugarðinum.

5. Á kirkjugarðsgøtum og vegum má eingin koyra, undantikið akfør hjá kommununi ella onnur, sum hava fingið serligt loyvi frá kirkjugarðsumsitingini (leiðandi gravara). Barnavognar og avlamistól/bilar undantikin.

6. Ikki er loyvt at arbeiða á kirkjugarðinum, útyvir vanliga røkt av gravstøðum, meðan jarðarferð er, umframt sunnu- og halgidagar, áðrenn sólarris og aftaná sólsetur yrkadagar og um summarið ikki aftaná kl. 20.00.

7. At klúgva um girðingar ella hegn er ikki loyvt.

8. Garðar, hegn, stik, gróðursetingar, minnismerki, gravsteinar ella annað skal hava frið.

9. Nummarspjøldur við gravirnar eru ogn hjá kirkjugarðinum, og mugu tey hvørki flytast ella burturbeinast av teimum, ið eiga og røkja gravirnar.

10. Burturkast, gamlir kransar, lok og rusk skal koyrast í ruskíløtini.

11. Starvsfólk á kirkjugørðunum hava skyldu at gera vart við brot á hesar reglur og gravarfriðin s um heild á kirkjugørðunum.

12. Býráðið kann broyta og Føroya Stiftsstjórn skal samtykkja, áðrenn broytingar verða settar í gildi.

*Tórshavnar kommuna, tann 24. mai 2018.*